# Spyr um horvnu skjalakanningina

*Henrik Old, tingmaður, vil hava at vita, hvør veruliga orsøkin er til, at løgmaður ikki vil kanna loynilig skjøl í eysturevropeiskum skjalagoymslum*

ÓLAVUR Í BEITI

Henrik Old hevur sett løgmanni fyrispurning viðvíkjandi skjølum í eystureuropeiskum skjalagoymslum, og spyr spurningin, hvør veruliga orsøkin er til, at løgmaður ikki vil kanna loynilig skjøl í eystureuropeiskum skjalagoymslum?

Í viðmerkingunum, sigur Henrik Old, at eftir at kanningarnar í hernaðarmálinum vóru lidnar, og »Svartabók« fyrilá, kom greitt fram, at landsstýrið eisini ætlaði at kanna skjøl i eystureuropeiskum skjalagoymslum, og boðaði løgmaður eisini alment frá hesum.

**Rættast at bíða**

– Harumframt vísir løgmaður á í svari til Bjarna Djurholm, løgtingsmann, upp á fyrispurning um skjalakanningar í eystureuropeiskum skjalagoymslum, at hann heldur, rættast er at bíða við hesum kanningum, til frágreiðingin um verandi kanningar er liðug.

– Víðari sigur løgmaður í svari sínum, at sambært arbeiðsbólkinum, ið stendur fyri kanningini, verður hetta í ár (1999), og at tað tí eftir hansara meting er hóskandi, at peningur til víðkaðar kanningar á hernaðarøkinum verður settur á fíggjarlógina fyri ár 2000.

– Seinni hevur løgmaður sagt, at henda kanning fyribils varð av ongum, tí peningur ikki var tøkur til slíka kanning, sigur Henrik Old.



*Hvør er veruliga orsøkin til, at løgmaður ikki vil kanna eystureuropeiska skjalagoymslur, spyr tingmaður hjá Javnaðarflokkinum løgmann*



*Bjarni Djurholm, tingmaður, spyr landsstýrismannin í heilsumálum, um landsstýrismaðurin ætlarat seta pening av á fíggjarlógini fyri 2001 til keyp av sjúkrabilum*

# Sjúkrabilarnir niðurslitnir

*Tað tykist sum eingin langtíðarætlan er fyri, hvussu neyðsendar-og sjúkrabilarnir eiga at verða skiftir út, sigur Bjarni Djurholm m.a. í viðmerkingunum til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Bjarni Djurholm hevur sett Helenu Dam á Neystabø, heilsumálaráðharra, tríggjar spurningar viðvíkjandi sjúkraflutningstænastuni í sjúkrahúsverkinum. Bjarni Djurholm vil hava at vita, umnøkur langtíðarætlan fyri endurnýggjan av neyðsendar- og sjúkrabilum er fyri sjúkrahúsverkið? Ætlar landsstýrismaðurin at seta pening av á fíggjarlógini fyri 2001 til keyp av sjúkrabilum? Og ætlar landsstýrismaðurin at gera nakrar tillagingar í sjúkraflutningstænastuni sum heild, so hon verður bíligari at reka?

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, sigur Bjarni Djurholm, at støðan viðvíkjandi neyðsendar- og sjúkrabilum hjá sjúkraflutningstænastuni hjá Landssjúkrahúsinum eins og hjá hinum báðum sjúkrahúsunum er sera vánalig. Allir sjúkrabilarnir eru niðurslitnir, og kann tí beinleiðis vandi standast av hesi støðu.

– Neyðsendarbilarnir á Landssjúkrahúsinum hava ein miðalaldur um 8 ár. Tann elsti er 14 ára gamal. Sjúkrabilarnir á Landssjúkrahúsinum hava ein miðalaldur um 7 ár, harav tríggir eru 12 ára gamlir, sigur Bjarni Djurholm.

**Knappa hálva mió. km**

– Flestu sjúkrabilarnir á Landssjúkrahúsinum hava koyrt millum 250000 og 450000 km, so tað er eyðsýnt, at tørvur er á at skifta bilarnar út í næstum. Tað tykist sum eingin langtíðarætlan er fyri, hvussu neyðsendar-og sjúkrabilarnir eiga at verða skiftir út. Tí verða bilarnir áhaldandi umvældir við tí úrsliti, at samlaðu umvælingarkostnaðirnir, sum frálíður, verða ovurhonds stórir.

– Úrslitið er eisini, at sjúkrahúsverkið framhaldandi nýtir ótíðarhóskandi, niðurslitnar og óálítandi neyðsendar- og sjúkrabilar.

– Tað hevur ljóðað, at ætlanir hava verið um at umskipa sjúkraflutningstænastuna. Spurningurin er tí, um hesar ætlanir hava samband við møguligar langtíðarætlanir, tá ræður um at skifta út neyðsendar- og sjúkrabilarnar, sigur Bjarni Djurholm í viðmerkingunum og tí hevur hann eisini spurt.



# Páskasølan á Verkstaðnum á Brekku

Aftur í ár hevur Verkstaðurin á Brekku í Klaksvík sína árligu páskasølu av lutum sum brúkararnir hava gjørt.

Til hesa útsøluna hevur serligur dentur verið lagdur á páskaprýði. Talan er um pappírsklipp og málaðar páskadúkar. Annars verða eisini aðrir lutir, sum vanliga eru við til eina útsølu. Sum nakað nýtt hava tey seyma dukkuklæði, sum passa til tær nýggju nýmótans dukkurnar.

Páskasølan byrjar í dag og heldur fram til einki er eftir. Opið verður frá kl. 10.00 til 16.00 hvønn dag.

